# Eitt ø er ikki bara eitt ø

## – marknaðarfólk til Føroya Banka

**Føroya Banki er ein ógvuliga væl grundaður og gjøgnumførdur banki á øllum økjum. Tak til dømis bókstavin ø í navni okkara. Ikki bara eitt ø, men ein væl umhugsað føroysk finessa, rótfest og førleikafest eins og Føroya Banki. Soleiðis eru vit, og hevur tú hug at gerast ein partur av starvsliði bankans, bjóða vit tær starv á marknaðardeild okkara.**

### Starvið

Sum marknaðarfólk í Føroya Banka arbeiðir tú verkætlanargrundað og ert við í toyminum, sum røkir nýggja og unga brand okkara, ið varð ment til samleikaskiftið í 2007. Tú fært bestu umstøður at hvessa tíni evni, eins og tú fært rúm og frið at skipa tínar arbeiðsuppgávur, so at tær hóska til títt arbeiðs- og sinnalag. Tín meginábyrgd verður at marknaðarføra vinnu- og íløguøki bankans og at skipa innanhýsis samskifti okkara. Í hesum seinna er møguleiki at leggja til rættis eina nýggja innanhýsis samskiftisætlan.

### Tú

Tú arbeiðir við eldhuga, dugnasemi og framsøkni, eins og bankin. Tú hevur persónliga slagkraft, sigur tína meining og heldur høvdið kalt, tá ið á leikar. Tú samstarvar væl og dugir at fremja ásett mál saman við tínum starvsfeløgum.

Harumframt hevur tú sjálvandi útbúgving ella royndir í marknaðarføring/samskifti, eins og tað er fyrimunur at hava royndir við verkætlanarleiðslu ella samskipan. Tú hevur góðan førleika at skriva bæði føroyskt og enskt.

### Føroya Banki og marknaðardeildin

Sum fyrsti børsskrásetti banki í Føroyum er Føroya Banki eitt nýmótans arbeiðspláss, ið virkar eftir altjóða virkishættum. Marknaðardeildin, sum verður tín deild, hevur ábyrgd av samskifti og marknaðarføring bankans. Av spennandi uppgávum, sum deildin hevur staðið fyri, kunnu nevnast 100-ára hald bankans og samleikaskiftið í 2007. Á marknaðardeildini starvast í løtuni fimm fólk.

### Meira at vita

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Poulu M. Kass, leiðara fyri marknaðardeildini, á tel 330 464 ella á pmk@foroya.fo.

Skrivlig umsókn saman við avriti av CV og prógvum skal sendast til: starvsfolk@foroya.fo ella til P/F Føroya Banki, Att: Bjarki Mohr, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn og vera okkum í hendi **í seinasta lagi 13. juni.**

SENDISTOVAN

**FØROYA**BANKI



# Leiðari, pedagogar og hjálparfólk

Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna at byrja 15. august 2008 ella eftir avtalu. Eisini søkir frítíðarskúlin eftir:

| | |
|---|---|
| 2 pedagogum | 25 tímar um vikuna |
| 1 pedagogi | 20 tímar um vikuna |
| 1 hjálparfólki | 30 tímar um vikuna |
| 1 hjálparfólki | 27 tímar um vikuna |

Størvini verða sett frá 11. august 2008.

Í frítíðarskúlanum verða 60 børn úr 2. flokki eftir summarfrítíðina.

### Vit bjóða

- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran og ítróttur hevur stóran leiklut í gerandisdegnum
- møguleika at seta tín dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving
- tú verður partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnaleiðararnar

### Vit vænta at tú

- ert útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemið á einum frítíðarskúla
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi
- sær møguleikar framum vansar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

### Setanarviðurskifti

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

### Meiri fæst at vita

um starvið við at venda sær til Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra ella Katrina Petersen, deildarleiðara, telefon 30 20 10.

### Umsókn

saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar kommunu, Vaglið, postboks 32, 110 Tórshavn í seinasta lagi mánadagin 9. juni 2008.

**Tórshavnar kommuna**